**Fiskimálaráðið**

**Løgtingið**

Dagfesting: 1. november 2017
Mál nr.: 16/00518-44
Málsviðgjørt: HD-JN-JHT/KM

**Løgtingsmál nr. 31/2017: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum í 2017** (Strika kravið um, at keypt kvota skal veiðast í 2017 og at taka av avreiðingaravgjaldið)

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum í 2017

(Strika kravið um, at keypt kvota skal veiðast í 2017 og at taka av avreiðingaravgjaldið)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 150 frá 23. desember 2016 um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum í 2017, sum broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 6. juni 2017, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 1, stk. 6 verður 1. pkt. strikað.

**2.** Yvirskriftin yvir § 4 verður strikað.

**3.** § 4 verður strikað.

**4.** Í § 5, stk. 1 verður "§§ 2 og 4" broytt til: "§ 2".

**5.** Í § 6, stk. 1 verður "og avreiðingaravgjaldið, sambært § 4," strikað og "fella" verður broytt til: "fellur".

**6.** Í § 6, stk. 2 verður "og avreiðingaravgjaldið" strikað.

**7.** Í § 6, stk. 5 verður "og avreiðingaravgjaldið," strikað.

**8.** Í § 9, stk. 1 verður "ella avreiðingaravgjald" strikað.

### § 2

*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, men hevur virknað frá framløgudegnum.
*Stk. 2.* Eigari av fiskifari undir føroyskum flaggi, ið við fiskifari hevur fiskað við fiskiloyvi til annaðhvørt makrel ella norðhavssild, og har fiskifarið, áðrenn framløgudagin, sbr. stk. 1, landar til virkingar ella frystingar uttanlands ella letur móttøkuskipi undir fremmandum flaggi til virkingar ella frystingar, er viðvíkjandi avreiðingaravgjaldi fevndur av reglunum

um umrokningarfaktorar, innkrevjing og revsing í løgtingslógini um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum í 2017 fyri landingar áðrenn framløgudagin.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsøkir til uppskotið
Orsøkin til broytingaruppskotið er, at tað er ikki sannlíkt, at skipini fara at megna at fiska alla kvotuna av norðhavssild til matna í 2017, m.a. tí, at móttøkuorkan á landi er skerd í mun til undanfarin ár orsakað av, at Varðin Pelagic brendi í grund fyrr í ár. Talan er eisini um hægri kvotu enn undanfarin ár. Nakað er eisini eftir av føroysku makrelkvotuni í 2017. Lagt verður tí upp til at taka av avreiðingaravgjaldið í síni heild. Ætlanin er harafturat lata upp fyri, at egin árskvota fyri 2017 kann flytast til 2018 at verða fiskað.

### 1.2. Galdandi lóggáva
Í løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum í 2017 er í grein 1, stk. 6 ásett, at rætturin at veiða kvotu, keypt á uppboði, bert hevur gildi í 2017. Í viðmerkingunum til lógina til hesa áseting stendur, at “verður kvotan ikki fiskað við skipinum, fellur rætturin at veiða kvotuna burtur við ársenda 2017”. Møguleiki er sostatt ikki fyri at geva loyvi til, at kvota, keypt á uppboði í 2017, kann verða fiskað í 2018, uttan at hetta er í ósamsvari við løgtingslógina.

Harumframt ásetir løgtingslógin avreiðingaravgjald fyri landingar av makreli og norðhavssild uttan fyri Føroyar. Eigari av fiskifari undir føroyskum flaggi skal rinda avreiðingaravgjald á kr. 2,00 fyri hvørt kilo í rundari vekt av makreli og norðhavssild, sum fiskifarið landar til virkingar ella frystingar uttanlands ella letur móttøkuskipi undir fremmandum flaggi til virkingar ella frystingar. Eigari av fiskifari á føroysku landleiðunum, sambært § 28, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, skal rinda eitt avreiðingaravgjald á kr. 1,00 fyri hvørt kilo í rundari vekt av makreli og norðhavssild, sum fiskifarið landar til virkingar ella frystingar uttanlands ella letur móttøkuskipi undir fremmandum flaggi til virkingar ella frystingar. Avreiðingaravgjaldið skal gjaldast afturat veiðigjaldinum og skal gjaldast uttan mun til, um talan er um kvotu, sum er keypt á uppboðssølu, ella um talan er um kvotu, sum er lutað við heimild í lóg um vinnuligan fiskiskap.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at stuðla undir, at sum mest verður fiskað til matna av føroysku kvotuni av norðhavssild í 2017. Við munandi hægri kvotum, og minni móttøkuorku á landi í Føroyum í ár, í mun til undanfarin ár, er orsøk til at halda, at tað fer at standa á at fáa alla veiðuna til høldar í 2017. Av hesi orsøk verður lagt upp til broyting í løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum í 2017 soleiðis, at løgtingslógin ikki er ein forðing fyri, at avgerð kann takast um at flyta kvotu frá 2017 til 2018. Sjálv flytingin av kvotu yvir um ár er tó ikki partur av hesum uppskotinum, tí heimildin er í fiskivinnulóggávuni fyri 2018.

Harafturat er lagt upp til broyting í løgtingslóg um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum í 2017 soleiðis, at

avreiðingaravgjaldið verður avtikið. Mett verður, at henda broyting kann stuðla undir, at meira verður fiskað til matna av føroysku kvotuni av norðhavssild í 2017, nú móttøkuorkan á landi í Føroyum er skerd.

**1.5. Ummæli og ummælisskjal**
Uppskotið verður sent til hoyringar hjá Fiskivinnuráðnum, Vørn, Fíggjarmálaráðnum og Gjaldstovuni samstundis, sum tað verður borið Løgtinginum.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

**2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Avleiðingarnar av at taka av avreiðingaravgjaldið eru, at føroysk fiskifør fáa rúmari møguleika at avreiða norðhavssild uttanlands, tað ið eftir er av 2017. Annars verður broytingaruppskotið í sjálvum sær ikki mett at hava fíggjarligar avleiðingar fyri landið, eitt nú tí, at føroysk skip at kalla einki hava avreitt av norðhavssild og makreli uttanlands higartil í 2017. Mett verður, at broytingin ikki fer at nerva virksemið hjá uppsjóvarvirkunum á landi.

Uppskotið verður ikki mett at hava fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur. Avtøka av avreiðingaravgjaldinum, tað ið eftir er av 2017, verður ikki mett at ávirka virksemið á móttøkuvirkjum í Føroyum.

**2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

**2.3. Avleiðingar fyri vinnuna**
Uppskotið verður mett at hava positivar fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna á sjónum av tí, at avreiðingaravgjaldið verður tikið av. Annars verður broytingaruppskotið í sjálvum sær ikki mett at hava fíggjarligar avleiðingar fyri vinnuna.

Mett verður ikki, at uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri vinnuna.

**2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

**2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Uppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

**2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Mett verður ikki, at tað eru bindingar í millumtjóðasáttmálum, sum gera, at uppskotið fær fíggjarligar, umsitingarligar, umhvørvisligar ella aðrar avleiðingar fyri landsmyndugleikar, kommunumyndugleikar, ávís øki í landinum, ávísar samfelagsbólkar ella vinnuna.

**2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður ikki, at uppskotið er í ósamsvari við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, herundir Evropeiska mannarættindasáttmálan ella Sáttmála Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

### 2.9. Marknaforðingar
Mett verður ikki, at uppskotið hevur við sær marknaforðingar.

### 2.10. Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv
Uppskotið til broyting í løgtingslóg um serstakar treytir hevur ikki ásetingar um revsing, útpanting ella sektir.

### 2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið tekur av avreiðingaravgjaldið, sum í galdandi løgtingslóg er kr. 2,00 fyri hvørt kilo av makreli ella norðhavssild, sum verður landað til virkingar ella frystingar uttanlands, ella til virkingar ella frystingar til móttøkuskip undir fremmandum flaggi og kr. 1,00 fyri eigarar av fiskifari á føroysku landleiðunum, sambært § 28, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap.

### 2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

### 2.13. Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur?
Uppskotið leggur ikki skyldur á fólk.

### 2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur?
Uppskotið leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein annan enn landsstýrismannin ella til kommunur.

### 2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

### 2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar enn tær, sum eru nevndar omanfyri.

### 2.17. Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

## Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

### 3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

**Til § 1, nr. 1**
Ásett er í grein 1, stk. 6, 1. pkt., at rætturin at veiða kvotuna, keypt á uppboðssølu, bert hevur gildi í 2017. Við hesari broyting verður ásetingin strikað, soleiðis at ásetingar í hesi løgtingslóg ikki eru ein forðing fyri seinni at taka avgerð um, við heimild í fiskivinnulóggávuni, at loyva flyting av kvotu frá 2017 til 2018.

**Til § 1, nr. 2 og 3**
Við hesi broyting verður kravið um avreiðingaravgjald tikið av. Tað, sum eftir er av 2017, skal eigari av fiskifari undir føroyskum flaggi sostatt ikki rinda avreiðingaravgjald á kr. 2,00 fyri hvørt kilo í rundari vekt av makreli og norðhavssild, sum fiskifarið landar til virkingar ella frystingar uttanlands ella letur móttøkuskipi undir fremmandum flaggi til virkingar ella frystingar, og eigari av fiskifari á føroysku landleiðunum, sambært § 28, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, skal ikki rinda avreiðingaravgjald á kr. 1,00 fyri hvørt kilo í rundari vekt av makreli og norðhavssild, sum fiskifarið landar til virkingar ella frystingar uttanlands ella letur móttøkuskipi undir fremmandum flaggi til virkingar ella frystingar. Lagt verður upp til, at strikingin av avreiðingaravgjaldinum fær gildi frá framløgudegnum at rokna, sí nærri undir § 2.

**Til § 1, nr. 4-8**
Vísandi til, at kravið um avreiðingaravgjald verður tikið av, verður "avreiðingaravgjald" strikað í ásetingunum í lógini annars, t.e. í grein 5, stk. 1 um umrokning til runda vekt, grein 6, stk. 1, stk. 2 og 5 um innkrevjing og grein 9, stk. 1 um revsing. Vísast skal tó til skiftisregluna í § 2, stk. 2.

**Til § 2**
Stk. 1. Ásett verður, at løgtingslógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, men at hon fær virknað frá framløgudegnum. Um broytingaruppskotið verður samtykt, verður eigari av fiskifari sostatt undantikin at rinda avreiðingaravgjald frá tí degi, at uppskotið er lagt fram á Løgtingi.

Stk. 2. Ásett verður ein skiftisregla fyri landingar uttanlands fram til framløgudagin á Løgtingi. Reglurnar í áður galdandi løgtingslóg um avreiðingaravgjald, verða frameftir galdandi fyri eigarar av fiskifari undir føroyskum flaggi, ið fiska við fiskiloyvi til annaðhvørt makrel ella norðhavssild, og har fiskifarið áðrenn framløgudagin hevur landað til virkingar ella frystingar uttanlands ella latið veiðu til móttøkuskip undir fremmandum flaggi til virkingar ella frystingar. Tað vil t.d. siga, at um ein eigari hevur landað uttanlands, áðrenn framløgudagin á Løgtingi, men innkrevjingin fer fram eftir framløgudagin, tá skal innkrevjast sambært reglunum í áður galdandi lóg, t.e. løgtingslóg nr. 150 frá 23. desember 2016 um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum í 2017, sum broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 6. juni 2017. Sama er galdandi fyri umrokningarfaktorar og revsing í sambandi við avreiðingaravgjaldið. Landingar uttanlands, eftir framløgudagin í Løgtinginum, verða harafturímóti við hesum uppskoti undantiknar at rinda avreiðingaravgjald. Skiftisreglan er bert galdandi fyri landingar uttanlands, sum eru farnar fram, áðrenn framløgudagin á Løgtingi.

Fiskimálaráðið, 1. november 2017

**Høgni Hoydal (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| **Galdandi orðingar** | **Løgtingslógaruppskotið** |
|---|---|
| | **§ 1**<br><br>Í løgtingslóg nr. 150 frá 23. desember 2016 um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum í 2017, sum broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 6. juni 2017, verða gjørdar hesar broytingar: |
| *Stk. 6.* Rætturin at veiða kvotuna, keypt sambært stk. 1, hevur bert gildi í 2017. | **1.** Í § 1, stk. 6 verður 1. pkt. strikað. |
| *Avreiðingaravgjald* | **2.** Yvirskriftin yvir § 4 verður strikað. |
| **§ 4.** Eigari av fiskifari undir føroyskum flaggi skal rinda eitt avreiðingaravgjald, sum er 2,00 kr. fyri hvørt kilo í rundari vekt av makreli og norðhavssild, sum fiskifarið fiskar við fiskiloyvi til annaðhvørt makrel ella norðhavssild í 2017, og sum fiskifarið landar til virkingar ella frystingar uttanlands ella letur móttøkuskipi undir fremmandum flaggi til virkingar ella frystingar.<br><br>*Stk. 2.* Hóast ásetingina í stk. 1 skulu eigarar av fiskiførum á føroysku landleiðunum, sambært § 28, stk. 1 í løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap, rinda eitt avreiðingaravgjald, sum er 1 kr. fyri hvørt kilo í rundari vekt av makreli og norðhavssild, sum fiskifarið fiskar við fiskiloyvi til annaðhvørt makrel ella norðhavssild í 2017, og sum fiskifarið landar til virkingar ella frystingar uttanlands ella letur móttøkuskipi undir fremmandum flaggi til virkingar ella frystingar. | **3.** § 4 verður strikað. |

| | |
|---|---|
| *Stk. 3.* Avreiðingaravgjaldið, sambært stk. 1 og 2, verður ikki lagt á veiðu, sum fiskifarið letur skipi undir fremmandum flaggi, sum flytur veiðuna til virkingar ella frystingar til virki á landi í Føroyum, ella til virkingar ella frystingar til móttøkuskip undir føroyskum flaggi.<br><br>*Stk. 4.* Avreiðingaravgjaldið fer í landskassan.<br><br>**§ 5.** Í sambandi við gjøldini, sambært §§ 2 og 4, skulu teir í stk. 2-4 nevndu umrokningarfaktorar nýtast til umrokning av fiski og fiskavøru til runda vekt.<br><br>**§ 6.** Veiðigjaldið, sambært § 2, og avreiðingaravgjaldið, sambært § 4, fella til gjaldingar so hvørt, veiðan er avreidd.<br><br>*Stk. 2.* Vørn ger upp veiðigjaldið og avreiðingaravgjaldið og sendir eigara av fiskifarinum rokning mánaðarliga.<br><br>...<br><br>*Stk. 5.* Veiðigjaldið og avreiðingaravgjaldið, umframt renta og møguligur innkrevjingarkostnaður av hesum, kunnu krevjast inn við panting. TAKS fremur panting eftir reglunum um innkrevjing av skattum.<br><br>**§ 9.** Tann, sum við tí í hyggju at sleppa undan at gjalda veiðigjald ella avreiðingaravgjald sambært hesi lóg greiðir rangt frá ella á annan hátt gevur villleiðandi upplýsingar at fara eftir, tá gjøldini skulu gerast upp, verður revsaður við sekt ella fongsli upp í 2 ár. | **4.** Í § 5, stk. 1 verður “§§ 2 og 4” broytt til: “§ 2”.<br><br>**5.** Í § 6, stk. 1 verður “og avreiðingaravgjaldið, sambært § 4,” strikað og “fella” verður broytt til: “fellur”.<br><br>**6.** Í § 6, stk. 2 verður “og avreiðingaravgjaldið” strikað.<br><br>**7.** Í § 6, stk. 5 verður “og avreiðingaravgjaldið,” strikað.<br><br>**8.** Í § 9, stk. 1 verður “ella avreiðingaravgjald” strikað. |
| | **§ 2**<br><br>Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, men hevur virknað frá framløgudegnum.<br>Stk. 2. Eigari av fiskifari undir føroyskum flaggi, ið við fiskifari hevur fiskað við fiskiloyvi til annaðhvørt makrel ella norðhavssild, og har fiskifarið, áðrenn |

| | |
|---|---|
| | framløgudagin, sbr. stk. 1, landar til virkingar ella frystingar uttanlands ella letur móttøkuskipi undir fremmandum flaggi til virkingar ella frystingar, er viðvíkjandi avreiðingaravgjaldi fevndur av reglunum um umrokningarfaktorar, innkrevjing og revsing í løgtingslógini um serstakar treytir fyri fiskiskapi eftir makreli, norðhavssild og svartkjafti og botnfiski í Barentshavinum í 2017 fyri landingar áðrenn framløgudagin. |